# Áðrenn aðalfundin í Atlantsflogi í morgin

SJÚRÐUR SKAALE



**Nýggi vinnupolitikkurin tekur skap. Og uppskriftin er einføld: Øll makt til landsstýrið!**

Eitt hart kroyst privat partafelag - Smyril Line - kemur til landsstýrið og biður um hjálp fyri at yvirliva. Landsstýrið játtar - men misnýtir støðuna til at krevja rættin at velja meirilutan í nevndini.

Ein lutvíst privatiseraður banki hevur aðalfund. Grunnurin sum umboðar landsstýrisins ognarpart finnur eitt hol í lógini, og heldur seg burtur frá aðalfundinum. Á tann hátt fáa hesi almennu umboð forðað fyri, at privatu eigararnir fáa ta umboðan, sum tilkemur teimum. Einki orð hoyrist frá landsstýrinum, sum bara tykist tiga og samtykkja.

Eitt lutvíst privatiserað flogfelag skal hava aðalfund hósdagin. Og landsstýrið ætlar at kroysta privatu eigararnar úr nevndini við teirri patetisku grundgeving, at landsstýrið umboðar Føroya fólk, og tí vil tryggja Føroya fólki rættvísa nevndarumboðan.

**Mann aftrar seg**

Mann stendur í eini tvístøðu, tá slíkt kemur fram.

Øðrumegin aftrar mann seg við at siga ov nógv alment um tað. Hesar fyritøkur hava jú tørv á friði og stabiliteti, og kritiskar røddir frá politiskari síðu kunnu skapa júst ta øvuta.

Hinvegin hevur mann skyldu til at tala at, tá landsstýrið ber seg skeivt at. Og í minsta lagi at seta teir spurningar, sum hanga í luftini og hvørki verða settir ella svaraðir.

Eg fari tí at loyva mær at gera hesar viðmerkingar frammanundan aðalfundinum í Atlantsflogi, sum verður í morgin.

**Starvsfólk undir illgruna**

Bæði Johan Dahl og Kaj Leo Johannesen hava sagt, at endamálið við at umskipa nevndina í felagnum er at tryggja, at Føroya fólk fær ta umboðan, ið samsvarar við tess ognarpart. Og gjøgnum landsstýrið eigur Føroya fólk sum kunnugt tveir triðingar av felagnum.

Á seinasta aðalfundi valdi landið tvey umboð, og privatu eigararnir eitt umboð. Her skuldi sostatt ikki verið nakar trupulleiki.

"Trupulleikin" hjá Johan og Kaj Leo er, at starvsfólkini eisini valdu tvey umboð. Tí eigur landið bara tvey av fimm umboðum. Og tí kann landið koma í minniluta. Um privata umboðið og starvfólkaumboðini taka seg saman, eru tey jú trý móti tveimum.

Men hesum er einki óvanligt í. Tað er ásett í lóg, at starvfólkini í einum partafelag skulu hava minst helvtina so nógv nevndarumboð sum tey, ið vald verða á aðalfundinum. Um talið er ólíka, verður rundað uppeftir. Tvs. at verða tvey vald á aðalfundi, velja starvsfólkini eitt. Verða trý vald á aðalfundi, velja starvsfólkini tvey. Og verða fýra vald á aðalfundi, velja starvsfólkini tvey.

Hetta merkir, at eingin eigari nakrantíð hevur eina nevndarumboðan, ið svarar til hansara ognarlut. Landið eigur t.d. 100% av Føroya Tele, men velur bert 2/3 av nevndarlimunum - hinar eiga starvsfólkini.

**Byggir á illgruna**

Í Atlantsflogi vórðu seinast trý umboð vald á aðalfundi. Tvey av landinum, og eitt av privatum eigarum. Og tí hava starvsfólkini eisini valt tvey.

"Fintan" hjá Johan og Kaj Leo er, at teir rokna starvsfólkini uppí tann privata partin.

Starvsfólkaumboð verða vanliga roknað sum neutral umboð, tá um stórar avgerðir ræður. Men argumentatiónin hjá Johan og Kaj Leo byggir á ein illgruna um, at hesi umboð kunnu fara í part við umboðnum fyri privatu eigararnar - og venda sær móti landsins áhugamálum.

Teoretiskt er hetta sjálvandi ikki óhugsandi - men tað byggir á ein álvarsaman illgruna, sum landsstýrið átti at grundgivið fyri.

Og er illgrunin galdandi fyri starvsfólk hjá Atlantsflogi, so má hann vera galdandi fyri øll onnur starvsfólk eisini! Og so átti landsstýrið heldur at broytt ásetingina um, at starvsfólk skulu vera so væl umboðað í slíkum nevndum!

**Øll makt til landsstýrið!**

Í morgin fer landsstýrið at velja fýra umboð í nevndina. Starvsfólkini sleppa at velja tvey - meðan privatu eigararnir einki umboð sleppa at velja. (Hóast teir, eftir rokið sum var, sum skilst eru slopnir at skjóta onkran upp).

Hetta er ikki ólógligt - hóast fleiri siga tað vera brot á tær fortreytir, sum vórðu settar upp, tá privatfólk vórðu biðin um at seta pening í føroyska flogfelagið.

Isolerað sæð er tað heldur eingin vanlukka, at landsstýrið á hendan hátt tryggjar sær meirilutan í nevndini.

Men tann samlaða myndin av tí, sum hendir, er ørkimlandi: Hugsa um fiskivinnusamráðingar. Svartkjaftabýti. Smyril Line. Atlantsflog...

Myndin er, at politikkur og vinnulív renna saman í eitt, tí menn vilja reka vinnulív úr sínum politiska sessi.

Vit hava fatalar royndir av hesum úr Føroyum. Men tað er tann vegin, við fara. Sum Johan Dahl sambært frágreiðing skal hava sagt við stóra privatan eigaran í Atlantsflogi, Adrian Noskwith: "I'm a good politician and a good businessman"!

Bæði Johan og Kaj Leo vilja fegnir privatisera. Men teir vilja ikki taka natúrligu avleiðingarnar av hesum – nevniliga at teimum ávirkan, ið hava sett milliónir í. Nei, teir vilja heldur sleppa at ávirka sjálvir gjøgnum sín politiska sess!

(Og í tí sambandi má mann eisini spyrja seg sjálvan hvussu góðir "businessmenn" teir nú vóru, tá teir royndu seg á privata marknaðinum...).

Hóast kapitalisman er í kreppu, er loysnin ikki politiskt vinnulív.

Men alt bendir á, at tað er enn eitt stig tann vegin, tikið verður í morgin, tá Atlantsflog hevur aðalfund.

# Undran

SIGRÚN MOHR



Tann 28. januar í ár svaraði Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, 10 fyrispurningum, ið Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, setti henni.

Spurningur nr. 10 var soljóðandi:

**Hevur landsstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina ætlan um, hvussu bráðfeingistørvurin innan eldraøkið verður loystur?**

**Ein partur av svarinum var soljóðandi:**

"Eg eri í samstarvi við Heilsumálaráðið farin undir at umrøða møguleikar, ið kunnu loysa trupulleikan við, at sjúklingar, ið eru liðugt viðgjørdir, ikki sleppa út av sjúkrahúsinum, men enn havi eg onga ítøkiliga loysn. Sum landsstýriskvinna síggi eg tað sum mína ábyrgd at virka fyri, at bráðfeingistørvurin altíð er so avmarkaður sum yvirhøvur gjørligt og kann tí vissa Løgtingið um, at arbeitt verður við at finna ymiskar loysnir, ið kunnu viðvirka til, at trupulleikin við bráðfeingistørvinum verður loystur. Tískil havi eg tikið stig til eina tørvskanning, ið lýsir heildartørvin á eldraøkinum. Tørvskanningin verður gjørd í samstarvi við Nærverkið.

Landsstýrið fer at halda fram við at stuðla kommunalari bygging av ellis- og røktarheimum og sambýlum fyri at nøkta tørvin á búplássum til røktarkrevjandi. Eg fegnist um, at samgongan hevur givið mær undirtøku til at hækka studningslánini til kommunurnar úr **500.000 kr**. og upp í **800.000 kr**. fyri hvørt búpláss á ellis- og røktarheimi og úr **50.000 kr**. og upp til **80.000 kr**. fyri sambýlisbúpláss. Hendan hækkingin fer ætlandi at eggja kommunum til at útvega fleiri búpláss."

(endurgeving endað).

Henda stóra prísmun millum studningslánini til ávikavíst ellis- og røktarheimsbúpláss og sambýlisbúpláss undrist eg stórliga yvir, og loyvi eg mær tí at spyrja landsøstýriskvinnuna, hvørji krøv eru í sambandi við bygging av sambýlum, og hvørji krøv eru til bygging av ellis- og røktarheimum?

**Hvør setur krøvini?**

Hvørji krøv verða sett hesum stovnum?

Hvat fæst fyri pengarnar á einum ellis – og røktarheimi sammett við eitt sambýli?

Somuleiðis undrist eg stórliga yvir, hví tíð og peningur skal brúkast til at gera eina "nýggja" tørvskanning. Í 2002 lat ein arbeiðsbólkur úr hondum 'Álit um eldraøki', har gjørd varð:

- Lýsing og meting av eldraøkinum
- Framtíðarskipan av eldraøkinum
- Dagføring av eldraøkinum
- Uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunu

Í 2005 var gjørd Tørvskanning av eldrabústøðum (ellis- og røktarheim og sambýli)

Skuldi ikki verið so torført at brúkt hesi álit/tilmæli sum grundarlag undir arbeiðinum innan eldraøkið - tað er bæði lætt og vanligt at gera framskrivingar ella forsagnir (prognosur) – m. a. fyri at spara pening og tíð!

fk Matseðil

Hósdagin 23. apríl
**Rullusteik / Karrygrýta**

Fríggjadagin 24. apríl
**Lasagna / Skinkusnitzel / Kjøtfrikadellur**

Leygardaginin 25. apríl
**Stongt**

Mánadagin 27. apríl
**Knettir / Stoktur medistari**

Týsdagin 28. apríl
**Nakkafillét / Saltað neytakjøt**

Mikudagin 29. apríl
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.